# Eitt heim er meira enn eitt hús



**Rákið, við undirtemanum Heimið, er hesaferð eitt heilt lítið grannalag við ymiskum bústøðum og dreymum um tað perfekta heimið. Vit støkka inn á gólvið uppi millum Gilja, har Mariann frá Royal og maður hennara, Rúni Brimvik, vísa okkum teirra dreymahús. Eitt nú hava tey sjónvarpsskíggja í hvørjum rúmi og fjarðstýrdan streym í øllum húsinum.**

**Hinumegin práta vit við Ólav Frederiksen, sum brúkar nógva orku upp á at spara.. – ja, orku. Hann hevur sett sær fyri ongantíð at rinda eina oljurokning aftur. Eisini ætlar hann sær nú at seta eina vindmyllu upp, ið skal løða lítla grøna bilin, sum hann skjótt fer at koyra runt í.**

**Og heilt uppi í brekkuni leggja vit leiðina framvið hjá Bjørghild og Martin Djurhuus, sum fortelja um, hvussu tey brúka húsini heilt øðrvísi í dag, enn tá ið børnini búðu heima.**

**Fór at hugsa um, at tað hevði verið stuttligt, um fólkini í greinunum skiftu um bústað í eitt tíðarskeið, tí tey hava rættiliga ymisk krøv til dreymaheimið. Til dømis at Ólavur flutti yvir til Mariann og tey, sum so kundu flutt heim til Bjørghild og so víðari.**

**Í tí meira álvarsliga endanum hava vit tikið advokatin, Gunn Ellefsen, til viks, so hon kann greiða okkum frá, hvussu hjún eru stødd peningaliga, tá parlagið krasjar. Her er veruliga nógv at læra, tí eru vit ikki á varðhaldi, kann kærleiksævintýrið skjótt gerast ein ræðandi veruleiki.**

*Rigmor*

• • •


**RÁKIÐ *Heimið* – november 2009**
**Postbox 76, 110 Tórshavn**
**post@sosialurin.fo**

**REDAKTØRUR**
**Rigmor Dam**
**rigmor@sosialurin.fo**

**BLAÐFÓLK**
**Rigmor Dam**
**Bjørk K. Olsen**
**Inna Törnroos**
**Eirikur í Jákupsstovu**

**MYNDIR**
**Jens Kristian Vang**
**Álvur Haraldsen**

**LÝSINGAR**
**Marknaðardeildin**
**lysing@sosialurin.fo**

**ÚTGEVARI**
**Sp/f Sosialurin**

**FORSÍÐAN**
**Oman móti sandinum í Leynum standa gomlu húsini hjá Bakkalenu.**
**Í dag verða húsini leigað út til frítíðarhús.**
**Mynd: Jens Kristian Vang**


# Elskuligt og brúkiligt

## Handlarnir fáa alla tíðina nýggj herlig ting, sum vit ynskja okkum

**Amboðini** við blómum eru so fín, at tey kunnu liggja frammi. Her eru hamari, tong og skrúvublað. Inni í hamaranum finnur tú fleiri smá skrúvubløð. Og inni í skúvublaðnum finnur tú eisini fleiri støddir av bløðum, sum tú kanst seta á skaftið. Mekanikarin í Miðlahúsinum sigur, at hetta eru góð amboð.
Settið fæst hjá Madam Gaardbo í Vágsbotni





## Fittasti veggurin

Tapetveggur við smáum myndum frá hollendska PIP studios. Fæst við reyðari, bláari og ljósareyðari bakgrund. Bílegg frá www.blandet-landhandel.dk, sum eisini senda til Føroyar





**Nostalgidósir** í fleiri støddum. Ein stór, tríggjar smærri, sum hoyra saman, og ein lítil við rundum undirløgum í. Funnið hjá Madam Gaardbo í Vágsbotni